Jógvan við Keldu sigur, at blokkurin dettur niður í Havn. Nú verður hann so frystur á Skálatrøð.

**Maður, 40 ár**

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein / Inna Törnroos

# Miðlamjarr



*Tíðin er farin frá almennum miðlum. Slíkir rigga best í einræðislondum og ikki í einum demokratiskum samfelagi.*

Svenning av Lofti um Kringvarpið



*Um so var, at tey føroysku sjúkrahúsini lógu í Danmark, so vóru øll trý niðurløgd við brestin.*

Jákup Petersen, yvirlækni

Verið ikki bangin fyri at prøva nakað nýtt, alt kann lata seg gera,hugsið bara um, at tað vóru amatørar í bygdu "Nóa Ark", og tað vóru professionell, sum bygdu "Titanic".

**Kvinna, 55 ár**



*Tvíburarnir eru sera ljótir.*

Prinsgemalurin Heindrikkur tosar um nýføddu abbabørnini (BT)



*Mistøk motivera meg til at arbeiða enn harðari.*

Golfspælarin Natalie Gulbis



Fái Mac av PC'arum

**Kvinna, 40 ár**

*Vit fara at hava 190 pør av skoytum í øllum støddum.*

Heðin Mortensen greiðir frá um nýggja skoytubreytin hjá Tórshavnar kommunu (Portal.fo)

Fínasta slag, at tað stendur "keep away from fire" á nýggjum barnaklæðum. Man er jú so ósikkur sum nýggj mamma - so tað er gott, at man sleppur frá at hugsa um tað.

**Kvinna, 40 ár**

*- Eg havi í løtuni eina F- ella H-skál, men nýggju boppurnar skulu verða tvífalt so stórar.*

Føroyski stripparin Victoria Wild sigur, at vinnur hon kapping í Ekstrablaðnum um at blíva ársins síðu-9 genta, fara pengarnir til nýggjar boppur (Ekstrablaðið)

